












# Framtíðin hjá Føroyum liggur í øktum samstarvi við Bretland

**Jóannes Eidesgaard er júst afturkomin av landsfundi hjá Labour og nú fer hann at bjóða umboðum fyri enska arbeiðaraflokkin við á landsfund hjá føroyska javnaðarflokkinum í næsta mánað**

ALTJÓÐA SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

– Tað er onki at ivast í, at framtíðin hjá føroyskum vinnulívi og føroyska samfelagnum annars, liggur fyri ein stóran part í einum øktum samstarvi við Bretland.

Tað er Jóannes Eidesgaard, formaður í føroyska javnaðarflokkinum, púra sannførdur um.

Hann er júst afturkomin av landsfundi hjá enska arbeiðaraflokkinum Labour. Hetta er aðru ferð, at føroyski javnaðarflokkurin er á landsfundi hjá Labour .

Og Jóannes Eidesgaard sigur, at ein orsøk til, at hann tók av innbjóðingini at vera við á landsfundinum enska stjórnarflokkinum, er ein roynd at fáa betri samband ímillum bretskar og føroyskar politikarar og við bretar yvirhøvur.

–At vit hava verið á landsfundi er bara fyrsta stigi í eini roynd at fáa betri samstarv og økta samvinnu í lag við okkara næstu grannar, sigur Jóannes Eidesgaard.



*Tað var ein stór løta, tá ið eg fekk høvi at heilsa uppá enska forsætisráðharran, Tony Blair, sigur Jóannes Eidesgaard. Eidesgaard takkaði Blair fyri røðuna, sum hann sigur var mergjað, djørv, víðskygd, greið og kveikjandi*

Hann sigur, at samstarv okkara við Danmark og onnur norðurlond, eigur ikki at vera undirmett. Men tað skerst heldur ikki burtur, at Bretland er okkara næsti granni, tað er eitt ógvuliga stórt land við næstan 60 milliónum fólkum, tað er limur í ES og ein beinleiðis hurð inn í evropeiska samveldið og tí liggja nógvar avbjóðingar í einum slíkum samstarvi.

Hann vísir eisini á, at føroyingar og bretar hava nógv, felags áhugamál, bæði innan fiskivinnu, ferðavinnu, samferðslu, umhvørvi og ikki minst, oljuvinnuni.

– So tað er nógv at samstarva um og eg ivist ikki í, at føroyska samfelagið og føroyskt vinnulív í nógv størri mun eiga at leggja seg eftir samvinnu við Bretland. sigur Jóannes Eidesgaard.

## Vindeyga út í verðina

Jóannes Eidesgaard sigur, at Bretland hevur altíð verið og fer altíð at vera eitt av teimum londunum, sum seta síni týðiligu fingramerki á heimspolitisku dagskránna.

– Tað er í Bretlandi, at nógvar politiskar hugsjónir verða føddar, sum seinni breiða seg út um heimin. Bretland er sum ein politisk smiðja, har framtíðar politikkurin verður smíðaður, sum síðani so við og við breiðir seg um allan heimin, eisini til Føroya.

Tí heldur hann at tað hevur tydning, at føroyingar fylgja við í, hvat rørir seg í hesum máttmikla politiska veldi.

– Men føroyingar eru eisini vanir at samvinna nógv við bretar og tað eru mong mál, sum vit eru saman um.

Hann hugsar um umhvørvismál og serliga dálkingina, ið stendst av virkjunum í Sellafield og Dounray.

Hann hugsar eisini um fiskivinnumál og hann hugsar um samferðsluna, sum vit eru í ferð við at byggja upp aftur við regluligari flúgving og helst eisini við sigling framyvir. Føroyingar eru eisini so smátt farnir at brúka útbúgvingarstovnar í Bretlandi.

Og í oljuvinnuni er onki at ivast í, at vit koma at samvinna nógv.

–So tað er alt, ið talar fyri, at taka upp nógv tættari samstarv við bretar. Alt gott um samstarvi við Danmark og norðurlond, men tað skerst ikki burtur, at Bretland er eitt opið vindeyga út í Evropa og allan heimin og tað er Danmark ikki.

Jóannes Eidesgaard heldur, at ein orsøk til, at vit hava havt so nógva samvinnu við Danmark, er, at vit hava altíð havt ein sterkan sambandsflokk og ein sterkan tjóðveldisflokk á tingi, sum ikki hava víðari sjónarring enn at síggja møguleikar og avmarkingar í heimastýrislógini og tí ikki hava megnað at sæð møguleikarnar uttanfyri ríkið.

– At javnaðarflokkurin nú vendir eyguni aðrar vegir, er ein roynd at fáa føroyskan politikk at snúgva seg um onnur mál enn um Danmark og ein roynd at fáa innblástur aðrastaðni frá og tí roynir flokkurin nú at fáa tættari samstarv við stóra grannalandi fyri sunnan.

## Knýta samstarvsbond

Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta er orsøkin til at føroyski javnaðarflokkurin annað árið á rað tekur av innbjóðing frá Labour um at vera við á landsfundi teirra, sum hesuferð var í Blackpool.

– Ítøkiliga sigur hann, at endamálið við eini slíkari ferð er fyrst og fremst at knýta samstarvsbond, sum kunnu koma til nyttu seinni.

–Og tað heldur hann hevur eydnast.

– Ein landsfundur hjá Labour er ikki bara ein landsfundur, har tað ber til at hitta enskar politikarar. Bretland er eitt gamalt heimsveldi og á einum slíkum landsfundi eru politikarar og felagsskapir úr øllum heiminum til staðar.

Og á einum slíkum fundi eru ein ørgrynna av fundum, stórum og smáum, har fyrilestrar og røður verða hildnar og har tað ber til at kjakast um ymisk evni. Harumframt eru tað nógvir felagsskapir, sum halda fundir um ymisk viðurskifti.

– Talan er eisini um eina velduga framsýning, har ferðavinnan, fakfeløg teldufyritøkur o.s.fr., sýna fram.

## Tvær stórar løtur

Men Jóannes Eidesgaard sigur, at tað skerst ikki burtur, at tað, sum øll á landsfundinum bíðaðu eftir, var røðan, sum forsætisráðharrin, Tony Blair, helt týsdagin.

– Hann helt røðu í ein tíma í eini stúgvandi fullari høll, sum tók 3.000 fólk. Frammanundan var stórur áhugi fyri røðuni, tí Blair hevur verið í mótvindi seinastu tíðina, bæði tí at hann vil hava,at heilsuverkið fyri ein part skal fíggjast privat og tí at hann stuðlar USA í ætlanunum at leypa á Irak, vil einaræðisharrin har, ikki boyggja seg.

– Tony Blair vísti á, at eru vit ikki felags um at síggja vandan við yvirgangi og tann vanda, sum Irak er fyri heimssamfelagið, og mótvirka vit ikki hesum í felag, eru vit við til at máa støðið undan tí myndugleika, sum ikki bara USA og Bretland

*framhald á síðu 6*

